# Skúlanæmingar taka hond í á fiskavirkinum í Vestmanna

**Tríggir trolarar hava landað í Vestmanna hesa vikuna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Vestmanna hevur verið støðugt fiskaarbeiði, síðan gongd kom á aftur framleiðsluna, 10. januar í ár.

Jákup Eli Thomsen, virkisleiðari, sigur, at tey arbeiða við tveimum vaktum; tann fyrra frá 8-16 og tann seinna frá 16 til midnátt.

Eini 50 fólk eru á hvørji vaktini.

### Landingar

- Fyrstu dagarnir av árinum var minni fiskur í útboði í Føroyum, tí upsaprísurin í Skotlandi var rættiliga góður, einar 8-9 krónur fyri kg., og fleiri trolarar nýttu høvi at fara niður til Skotlands við fiskinum.

Jákup Eli sigur, at síðan verulig gongd kom á aftur eftir jóla- og nýggjárshøgtíðina, hevur eingin steðgur verið í framleiðsluni.

Nú mánadagin landaði Vesturbúgvin í Vestmanna. Teir høvdu 225.000 pund, meginparturin upsi. Í dag vænta tey Vesturtúgvuna og Grønanes, sum hava eini 240.000 pund tilsamans. Eisini her er meginparturin av veiðini upsi.

Virkisleiðarin sigur, at upsin í fyrstu lastunum, sum virkið keypti í ár, var rættiliga smáur, men nú er slagið betur.

- Vit hildu, at fiskurin bæði var smáur og rak, men nú sær betur út, sigur hann.

Jákup Eli sigur, at fiskurin, sum Vesturbúgvin hevði mánadagin, var góður.

- Tað vísir seg, at slagið avhongur nógv av, hvar skipini royna, leggur hann aftrat.

### Skúlanæmingar

Á virkinum hjá Fiskavirking í Vestmanna arbeiða tilsamans 100 fólk, og tað er ikki bara sum at siga tað at manna reinskeriborðini.

- Vit hava nakrar skúlanæmingar, sum plaga at hjálpa til á seinnu vaktini. Hetta eru framhaldsskúlanæmingar og næmingar, sum ganga á Fiskivinnuskúlanum.

Jákup Eli Thomsen sigur, at teir royna at vera so fleksiblir sum tilber.

- Onkur, sum arbeiðir á kvøldvaktini, ynskir bara at arbeiða hálva vakt, og tá kann tað vera heppið, um onkur næmingur kann taka hin helmingin av vaktini.

Virkisleiðarin sigur, at teir plaga at laga seg eftir slíkum umstøðum, tá ið fólk sjálvi kunnu finna út av at skipa seg saman.

# Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu á Fuglafirði við fullum skipi

**Nótaskipini hava rættiliga borið við svartkjaft á leiðunum við Írland, og bæði Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu hava fulla last. Nú eru onnur nótaskip á veg suður á hesar leiðir**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Finnur Fríði kom á Fuglafjørð á midnátt mikukvøldið við 2500 tonsum av svartkjafti, sum er full last. Tróndur í Gøtu verður væntandi inni fyrrapartin í dag; teir hava eisini fulla last, eini 2600 tons av svartkjafti.

Tað tekur umleið eitt samdøgur at landa skipini í Fuglafirði, og tá ið lastin er tóm, fara tey aftur á leiðirnar við Írland at royna. Siglitíðin hvønn vegin liggur um stívliga tvey samdøgur.

Sum skilst, eru onnur føroysk nótaskip eisini á veg suður á hesar leiðir, eitt nú Krúnborg og Christian í Grótinum.

Christian í Grótinum hevur verið ein túr á hestamakreli, men eftir hvat skilst, er hetta fyrsti túrurin hjá Krúnborg í ár.

### Kemur væl við

Hetta er tíðin, tá ið svartkjafturin plagar at taka seg upp á leiðunum við Írland og so hvørt, sum tað líður út á várið, tekur hann seg norður yvir.

Góði fiskiskapurin kemur væl við hjá nótaskipunum, tí tað hevur sæð eitt sindur ivingarsamt út við svartkjaftinum í seinastuni.

Seinastu árini hevur stovnurin verið rættiliga hart troyttur, og ein ávísur ótti hevur verið um, hvørt slaki fiskiskapurin seinastu tíðina hevur samband við stóru royndina eftir svartkjafti, sum strandalondini ikki kunnu semjast um.



*Tróndur í Gøtu, sum her liggur høgt í sjónum, er fullur, nú hann kemur á Fuglafjørð við 2600 tonsum av svartkjafti fyrrapartin í dag*

# Partrolararnir rokast á upsaveiði

**Bakur og Stelkur eru nú á fimta túri í ár, og allar túrarnar uttan tann eina hava skipini verið full undir lúkurnar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er gott, at tað er nógvur fiskur at fáa, tá ið prísirnir eru so lágir.

Hetta er so sanniliga galdandi fyri upsan. Prísirnir hava verið og eru framvegis rættiliga lágir, men nøgdirnar, sum skipini føra til lands, eru velduga stórar. Upsin er framvegis smáttfallandi. Í minsta lagi 70% av veiðini hjá partrolarunum er upsi 3 og 4, og tað er rættiliga smáur fiskur.

### Á fimta túri

Sum heild fáa partrolararnir nógvan upsa, og nógv skip hava seinasta mánaðin siglt til lands – túr eftir túr – full undir lúkurnar.

Bakur og Stelkur eru nú á sínum fimta túri higartil í ár. Teir landaðu í Saltangará seinasta mánadag, og hendan túrin høvdu teir tilsamans 340.000 pund, og tá eru skipini full undir lúkurnar.

Men tað eru ikki bara Bakur og Stelkur, sum rokast í upsanum í løtuni. Tað gera fleiri aðrir partrolarar eisin.

Nýggju leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, landaðu í Saltangará týsdagin, og teir vóru eisini fullir undir lúkurnar. Hesi skipini taka nakað meira enn Bakur og Stelkur, og tí er væntandi, at veiðan hjá teimum hendan túrin mundi liggja um tey 400.000 pundini.

Týsdagin landaðu eisini Smaragd og Safir. Hesi skipini eru aftur smærri, men eisini teir vóru fullir undir lúkurnar av upsa.

Aftrat partrolarunum, hevur eisini onkur garnabátur landað hjá Beta hesa vikuna.

### Okkurt aftrat

Olaf Olsen, stjóri á Landingarmiðstøðini hjá Beta, sigur, at hesa vikuna hava teir havt nógv at gera.

- Her hevur nógv fólk verið til arbeiðis, og líkt er til, at onkur landing verður aftrat, áðrenn vikan er úti.

Stjórin væntaði í gjár, at onkur av gomlu Kuba -trolarunum kom inn at landa – í gjár ella í dag.

- Jú, tað er gott, at nógvur fiskur er at fáa, tá ið prísirnir eru so lágir, sigur Olaf Olsen.



*Fleiri skip hava landað hjá P/F Beta hesa vikuna og partrolararnir, sum veiða upsa, hava verið fullir undir lúkurnar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*